## Amager fekk javnt

FC Amager hevði trupulleikar í dystinum ímóti Thisted, men kláraði at bjarga sær javnleiki við máli seint í dystinum. Eftir ein málleysan javnleik, var tað oddaliðið í 1. deild, Thisted, sum setti seg alt meira á dystin í seinna hálvleiki. Eftir at teir høvdu lagt seg fram um 1-0 við góðum frísparksmáli, høvdu teir beina kós móti sigrinum. FC Amager formáddi sær lítið fram eftir vøllinum í seinna hálvleiki og høvdu fáar royndir á málið. Men í seinasta minuttinum av vanligu leiktíðini bar til. Eitt langt innkast inn í brotsteigin skapti vanda, og innskifti Thomas Myssing fekk kroyst bóltin í málið. Dysturin endaði 1-1, og tað mundu teir í FC Amager vera væl nøgdir við.



## Klinsmann í øðini

Jurgen Klinsmann, sum er venjari hjá týska stórfelagnum FC Bayern, er í øðini um gongdina hjá sínum liði. Bayern fekk um vikuskiftið bert javnleik, hóast liðið var á odda 3-1 seint í dystinum. - Vit mugu vinna ein dyst, har vit eru á odda 3-1 og hava stórar kjansir til at gera fleiri mál. Hetta fær meg illan, og vit mugu viðurkenna, at okkara úrslit als ikki eru tey, sum vit høvdu roknað við frammanundan, sigur Jurgen Klinsmann.

KÍ-ÍF 4-2 (1-0):

# KÍ av tindinum og í dalin og uppaftur

**Endaspurturin var so dramatiskur sum sjáldan, tá ið helmingurin av teimum seks málunum vórðu skorað í tíðini, sum dómarin hevði lagt afturat**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

*KÍ*

*ÍF*



*KÍ-fagnaðurin var skilliga stórur, tá tað í yvirtíðini eydnaðist at tryggja sær øll stigini móti ÍF*

*Mynd: Norðlýsið*

Hjá heimamonnunum snúði tað seg um lív ella deyð í fremstu fótbóltsdeildini, og tað sást væl á sinnisstøðuni. Eftir at Rógvi Jacobsen beinanvegin eftir hálvleiksthvíldina hevði snittað frísparksinnlegg úr vinstru frá Heðini á Lakjuni í málið og harvið tvífaldað heimaleiðsluna, var sannur rómur millum tey bláu og hvítu.

Í vikuni segðist tað vera ivasamt, um Rógvi fór at verða førur fyri at spæla, og tað varð eisini ivasamt, um Rodrigo fór at verða førur fyri at spæla. Brasilski álopsspælarin var so mikið væl fyri, at tað var hann, sum í 1. hálvleiki setti hol á, eftir at hann hevði sett krúllin undir innlegg úr høgru frá Eli Simonsen.

Tað var eisini um reppið, at hýrurin á heimafólkinum fór heilt í topp stutt eftir, at KÍ leiðslan var vorðin 2-0. Rodrigo og Rógvi vóru tætt við, og tað tóktist sum um, at Rógvi hevði økt um leiðsluna til 3-0, tá ið hann enn eina ferð við høvdinum stýrdi bóltin inn um ÍF málverjan.

Men dómarin kolldømdi í tí førinum, og so snaraði gongdin 180 stig, og heimaáskoðararnir vóru eina lítla løtu mest sum í koma.

Við skilagóða og stinna Høgna Madsen á odda og við Frank Poulsen sum hinum eyðsýnda sentrala miðvallaranum og Nenad Saric sum fínum framrættaðum manni í vinstru settu fuglfirðingar heimaliðið undir alt størri trýst, sum kundi havt borið uppaftur fleiri enn tvey mál við sær.

Frank Poulsen minkaði um munin, tá ið hann var fyrstur á returbólti eftir skotroynd frá Atla Petersen, og sum 2. hálvleikur leið, sótu og stóðu KÍ áskoðararnir alt meiri sum á nálum.

Bartal Eliasen varð fluttur fram í álopi, tá ið Knút Vesturtún varð settur inn í miðverjuna, og Jákup Mikkelsen hevði fram ímóti dystarenda, tá ið KÍ avrikið var alt annað enn sannførandi, tvær so meistarligar bjargingar, sum bara tann besti megnar.

Tá ið vanliga tíðin var farin, var støðan framvegis 2-1 til heimaliðið, men so skoraði ÍF, sum var undirmannað, tí Fritleif í Lambanum var farin skaddur av vølli, og harvið tóktist tað vera veruleiki, at fuglfirðingar høvdu bjargað sær upp á turt í kappingini um at sleppa undan niðurflyting, og at klaksvíkingar vóru uppaftur meiri tyngdir av hóttanini av niðurflyting. Tað sást og hoyrdist á tí, sum mest av øllum minti um deyðatøgn.

Men í handavend broyttist alt aftur. Hitamátarin hjá klaksvíkingum sprakk úr botni og heilt upp í hin endan: Jákup Mikkelsen sparkaði langt fram, Rógvi Jacobsen snittaði víðari við høvdinum, og Dagfinn Olsen bríkslaði fyri brotssparki, tí hann metti, at Knút Vesturtún í ÍF miðverjuni hevði spælt bóltin við arminum. Rodrigo umsetti trygt úr ellivu metrum.

3-2 og heimahýrurin kendist vera í toppi. Tað mundi hann kortini ikki vera heilt, tí góða lagið fór eyka tonn rætta vegin, tá ið innskifti Kristoffur Jakobsen staðfesti rimmar 4-2 heimasigurin.

### Uppskriftin upp á KÍ niðurflyting

| Lið | Mál | Stig |
|---|---|---|
| KÍ | 31-38 | 27 |
| ÍF | 31-46 | 27 |
| B71 | 26-46 | 22 |

KÍ: NSÍ (h), Víkingur (ú)
ÍF: B68 (ú), B71 (h)
B71: Víkingur (h), ÍF (ú)

Um B71 skal bjarga sær, so skulu sandoyingar vinna báðar sínar dystir, meðan ÍF ella KÍ einki stig skulu vinna.

Bæði KÍ og ÍF bjarga sær við einum stigi afturat.

KÍ møguleikin fyri at flyta niður er, at klaksvíkingar einki stig vinna afturat, at ÍF spælir javnt ella vinnur á Toftum, at B71 vinnur í Gøtu, og at sandoyingar í síðsta umfari fara at vinna í Fuglafirði.

ÍF møguleikin at flyta niður er, at ÍF einki fær burtur úr á Toftum og á Sandi, og at B71 vinnur bæði á heimavølli ímóti Víkingi og í innanhýsis botnuppgerðini í Fuglafirði.